# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Næmingar skulu ikki rinda prísin

Tað tyktist vera ein skilagóð ætlan, sum Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, borðreiddi við í Sosialinum í februar í fjør, tá hon mælti til at skipa føroyska fólkaskúlan í sjey skúladømi.

Tað hevur so ofta verið frammi, hvørt tað er rætt at varðveita allar teir smáu skúlarnar kring landið - og um vit skulu halda fast við gomlu skipanina við skúla í hvørjari bygd. Samferðslukervið er so nógv bøtt síðstu árini, at tú lættliga og trygt kanst flyta børn og ungdóm til skúla í aðrari bygd.

Landsstýriskvinnan segði, at tað sum vit vinna við at skipa Føroyar í skúlaøki, skal brúkast sum íløga í dygd og nútímansgerð av skúlanum. Hon vísti á, at stórur tørvur er á útbúnum lærarum, at tørvur er á fjølbroyttum eftirútbúgvingartilboðum, stórur tørvur er á dagførdum undirvísingarmiðlum, bæði vanligum undirvísingarmiðlum og teldutøkum, eins og undirvísingaramboðum yvirhøvur. Hon segði eisini, at nógvir skúlar lúka ikki krøv til nútímans frálæruhættir, og skúlabókasøvnini og námsligu verkstaðirnir eru ikki nóg góðir.

Hetta ljóðar sera skilagott, at vit spara í skúlaverkinum - og nýta peningin til at førleikamenna og dagføra sama skúlaverk. Her fáast fleiri flugur við ein smekk.

Men nú tykist kortini verða vent í holuni, tí nú ber ætlanin við at skipa landið í sjey skúlaøki brá av eini vanligari politikarasparíætlan - har tann góði gamli plenuklipparin verður nýttur við eittans endamáli.

Formaðurin í lærarafelagnum vísti í sama viðfangi í Sosialinum á, at um spardi peningurin við at leggja niður smáu skúlarnar kemur skúlaverkinum til góðar við at økja um dygdina, so er nógv vunnið. Men um endamálið bara eru sparingar, so er einki vunnið.

Í blaðnum fríggjadagin vísir Helena Dam á Neystabø á, at um fólkaskúlin skal hava sama tilboð í ár sum í fjør, so skulu sparast níggju milliónir krónur - og tí sigur hon, at bygnaðarbroytingarnar hava skund. Hon sigur eisini, at fólkaskúlin skal spara sjey milliónir krónur í lærarалønum seinna hálvár í ár - og at verða bygnaðarbroytingarnar ikki framdar nú, so verða tað næmingarnir, sum fara at rinda prísin.

Sjálvsagt eiga vit at gera allar neyðugar bygnaðarbroytingar - á øllum økjum. Og ongantíð betur, um spardi peningurin kann koma økinum sjálvum tilgóðar, eins og ætlað var á skúlaøkinum. Men tað er ikki rætt, at næmingarnir skulu rinda prísin við einum skúla í afturgongd.±

**Sosialurin**

## Eitt valdømi

BERGLJÓT MADSEN

Tað er vælgerandi at lesa greinina hjá Jonhardi Mikkelsen í bløðunum, har hann greiðir frá sínari hugsan um, at Føroyar eru best fyri við einum valdømi. Sjálvandi. Vit eru færri enn 50 túsund fólk, okkurt um 30 túsund hava valrætt. Tað er nakað tað sama sum Roskilde og Ålesund. Tað er einki at petta sundur. Landið er lítið í ummáls og lætt er at koma í samband, hvar tú so býrt. Vit hava fartelefonir, fasttelefonir, post, skype, teldur, t-brøv og facebook, bløð, útvørp og sjónvarp. Og vegir, skip og tyrlur binda oyggjarnar saman.

Eitt valevni hevur allar møguleikar at koma fram við sínari hugsan, óansæð um hon/hann býr í Hvannasundi, Havnini, Bø ella aðrastaðni. Og teir politikarar, vit velja á løgting, verða ikki so bundnir at sínum veljarum í nærumhvørvinum, men kunnu brúka sína megi til at hugsa breiðari og fríari til gagns fyri heildina.

Eitt valdømi fer at minka um tað lokalpolitiska stríðið, sum krevur so nógva orku av løgtinginum. Lat kommunurnar taka sær av lokalsamfelagnum. Um lokalu áhugamálini skulu hava meira vald, og alt gott um tað, ger tað so ikki umvegis lokalvaldum løgtingslimum, tí væntast kann, at løgtingslimirnir, sum vera man, tá fara at verja lokalu áhugamálini heldur enn landsins áhugamál.

Og hvør skal tá tala landsins sak? Latið okkum tí halda fast við hesa valskipanina við einum valdømi.

*Á boðanardegi Mariu.*

## Yvirlýsing frá Arbeiðarafeløgunum og Føroya Arbeiðsgevarafelag

*Arbeiðarafeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag hava biðið um fund við leiðsluna í samgonguflokkunum fyri at umrøða, hvørjar ætlanir eru í sambandi við fíggjarlógarkarmin fyri 2011, sum skal leggjast fram í komandi viku.*

Arbeiðarafeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag eru samd um, at ætlaninar hjá samgonguni at áleggja føroyska vinnulívinum fleiri skattir og avgjøld eru óskilligar. Stjórnir í londunum kring okkum hava seinasta 1½ árið gjørt skipanir fyri at lætta um hjá vinnulívinum fyri at tryggja arbeiðspláss og virksemi. Alskyns styttri og longri skipanir og serskipanir eru gjørdar, og lond flest royna at stýra ímóti sveigginum í búskapinum fyri at mótvirka fíggjarkreppuni, ið rakar um allan heimin.

Í Føroyum verður tað øvugta gjørt. Tað sæst í fíggjarlógini 2010, og ábendingar eru um, at gongdin heldur áfram.

Feløgini undrast á, at tað er vinnulívið, har tey flestu av teimum arbeiðsleysu koma frá, sum skal áleggjast fleiri byrðar fyri at fáa landskassaundirskotið niður.

Tað eru starvsfólk í vinnulívinum, sum standa fyri at skapa tey virðir, sum skulu økja um peningarenslið í almenna kassanum. Tískil er tað tilskundan til meira virksemi í vinnulívinum, sum er leiðin fram fyri at økja um inntøkur landskassans.

Tað er í primervinnunum, at ófaklærdu starvsfólkini starvast, og tað eru tey, sum fyrst gerast arbeiðsleys nú byrðarnar á vinnulívið økjast. Hetta sæst eisini aftur í hagtølunum, sum vísa, at 80% av teim arbeiðsleysu eru ófaklærd.

Arbeiðarafeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag eru samd um, at henda gongd má steðgast beinanvegin so fleiri arbeiðspláss ikki fara fyri bakka.

*Vegna,*
*Arbeiðarafeløgini*
**Ingeborg Vinther,**
**forkvinna í FA**
**Hans Joensen,**
**formaður í HAF**
**Vigdis Johannesen,**
**forkvinna í HAK**
**Jastrid Niclasen,**
**forkvinna Í kl. arb Kv.**
**Arthur Guðjónsson,**
**formaður Kl. Amf.**

*Føroya Arbeiðsgevarafelag*
**Jóhan Páll Joensen,**
**formaður**

## Eri ikki partur av samtyktini hjá skúlastýrinum



LEVI MØRK
Skúlastýrislimur hjá Tórshavnar Kommunuskúla

Viðmerkingar til grein hjá Hanusi Joensen, skúlastjóra, dagfest 19.03.2010 í Dimmalætting, sum hann nevnir »Viðmerkingar til ætlan býráðsins um fútaforboð«.

Eg taki ikki undir við, at mítt navn verður lagt til lesarabrævið hjá Hanusi Joensen, skúalstjóra.

Eg siti í løtuni í skúlastýrinum í Tórshavnar kommunuskúla, og eg kenni einki til hasa samtyktina, eri ikki ein partur av henni og taki ei heldur á nakran hátt undir við henni.

Skúlastjórin veit fullvæl, at eg meldaði klárt út á seinasta skúlastýrisfundi 18.03.2010, at eg vildi ikki viðgera mál um 10. flokk, tí tað stríðir ímóti býráðssamtykt, sum eg sjálvur eri partur av. Hetta er somuleiðis felt niður í gerðarbókina.

So lat meg staðfesta einaferð enn, at eg eri ikki partur av hesari samtyktini hjá skúlastýrinum frá 18.03.2010, ei heldur skrivinum, sum skúlastjórin hevur undirskrivað og sent til miðlarnar.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.